## Sjálvuppgávan 2004

**Sjálvuppgáva**
Ert tú løntakari og hevur fingið sjálvuppgávu, **skalt** tú útfylla hana og lata Toll- og Skattstovuni hana aftur í seinasta lagi **15. mars 2005**. Fyri roknskaparskyldug, eru aðrar freistir galdandi.

**Skattauppgerð**
Hevur tú fingið skattauppgerð, skalt tú kanna, at allar upplýsingar eru rættar. Eru tær rættar, skalt tú einki gera.
Eru upplýsingarnar skeivar ella vanta upplýsingar, t.d. B-inntøkur ella frádráttir, skalt tú útfylla eina sjálvuppgávu og lata hana inn. Sjálvuppgávan fæst á økisskrivstovunum kring landið. Eisini er hon í bóklinginum 'Skattinum 2004'.

**Ognaruppgerð**
Tað er bara neyðugt at lata ognaruppgerð inn, um broytingar eru í ogn og skuld í mun til 31. desember 2003. **Tó skulu øll tey, sum fáa ognaruppgerð frá Toll- og Skattstovani, lata hana innaftur.**

**Kapitalvinningssjálvuppgáva**
Øll hava fingið kapitalvinningssjálvuppgávu. Hevur tú aðrar kapitalvinningsinntøkur ella eru upplýsingarnar á kapitalvinningssjálvuppgávuni ikki rættar, skal hon útfyllast og latast Toll- og Skattstovuni í seinasta lagi **15. mars 2005**.

---

Er fullfíggjað sjálvuppgáva ikki latin inn rættstundis, eins og omanfyri er ásett, hevur Toll- og Skattstovan heimild at meta inntøkuna og harafturat at áleggja sekt.

Tú kanst eisini lata sjálvuppgávuna og kapitalvinningssjálvuppgávuna inn umvegis internetið.

**Sí heimasíðu okkara, www.tollskatt.fo**

**Toll- og Skattstova Føroya**
**Stýrið**

# TOYOTA CAMRY 2.2



Frá juli 1998, koyrt 120.000 km, bláur, v/powerstýring, aircondition, cruise control og aut. gear. Sera vælhildin bilur.

**Prísur: 135.000 kr.**

31 45 55 ella 59 45 55

Sosialurin 341800

## Marknaðarfólk

STARV sosialurin

Ert tú fyrikomandi, dugir tú væl at selja, ert tú álítandi, røkin og dugur at arbeiða sjálvstøðugt, so ert tú júst tann persónurin, sum vit leita eftir.

Til marknaðardeild okkara søkja vit eftir starvsfólki, sum kann vera viðvirkandi til framhaldandi at menna inntøkugrundarlag okkara. Høvuðsuppgávan verður at taka sær av dagliga arbeiðinum við blaðnum.

Lýsingarinntøkur eru ein týðandi partur av tilverugrundarlagnum hjá føroysku bløðunum, og tí leita vit støðugt eftir nýggjum hættum at menna hendan partin av fyritøkuni. Tí er tørvur á fólkum, sum duga at fáa og ikki minst arbeiða víðari við góðum hugskotum.

Í samstarvi við starvsfelagarnar á marknaðardeildini verður tú eisini við í dagligu framleiðsluni av blaðnum. Herundir tilrættislegging av lýsingarátøkum, temabløðum og lýsingartilboðum.

Løn verður ásett sambært avtalu.

Ljóðar hetta sum nakað fyri teg, so er bert at senda eina umsókn við frágreiðing um útbúgving og royndir til okkum. Ynskir tú at fáa meira at vita um starvið, ert tú vælkomin at seta teg í samband við Jonhard Hammer, marknaðarleiðara, á tlf. 341800. Tað ber sjálvandi eisini til at senda teldupost á jonhard@sosialurin.fo

Starvið verður at seta skjótast gjørligt. Umsóknarfreistin er 1. mars, og skal umsóknin saman við viðkomandi skjølum sendast til:

**Sosialurin**
**Marknaðardeildin**
**Postsmoga 76**
**110 Tórshavn**

Vit eru alla tíðina úti um okkum, og fimm ferðir um vikuna koma vit á gøtuna við einum nýggjum og feskum blað. Umframt tað verður blaðið hvønn dag lagt á internetið. Á Sosialinum starvast í dag uml. 25 fólk.

TÓRSHAVNAR KOMMUNA



**Heilsu- og umhvørvisdeildin**

- er partur av teknisku deild í Tórshavnar kommunu.

Heilsu- og umhvørvisdeildin umsitur mál, sum sambært umhvørvislóggávuni eru løgd undir kommununa at umsita.

Tekniska deild heldur til í miðbýnum í Havn saman við byggi- og býarskipanardeildini, snarskivuni og postverkinum í gamla posthúsinum.

- onnur leys størv? Hygg á www.torshavn.fo

## Starvsfólk til heilsu- og umhvørvisdeildina

Á heilsu- og umhvørvisdeildin hjá Tórshavnar kommunu, verður søkt eftir dugnaligum fólki til spennandi og avbjóðandi starv, har tú serliga kemur at arbeiða við heilsu- og umhvørvismálum. Umhvørvið viðkemur okkum øll, og her hevur tú møguleika at gera tína ávirkan galdandi saman við dugnaligum starvsfólki í umsitingini.

**Førleikakrøv**
Tann, ið sett/ur verður, skal hava útbúgving sum verkfrøðingur, byggifrøðingur, tekniskt hjálparfólk ella hava líknandi útbúgving, helst innan heilsu- og umhvørvi. Ynskiligt er, at tú hevur royndir innan øki og hevur kunnleika innan almennu fyrisitingina.

**Persónligir eginleikar**
Dentur verður lagdur á, at tú:
- ert før/ur fyri at arbeiða sjálvstøðugt
- arbeiðir við nærlagni og skynsemi
- er fyrikomandi og dugnalig/ur at samstarva

**Setanarviðurskifti**
Starvið verður sett skjótast til ber og lønt sambært sáttmála við avvarðandi yrkisfelag.

**Meiri fæst at vita**
um starvið við at venda sær Boða Haraldson, býarverkfrøðing, ella Janus Isfeldt, leiðara á starvsfólkadeildini, tlf. 302010.

**Umsókn**
saman við viðmælum, upplýsingum um útbúgving og royndir skal vera Tórshavnar kommunu, Postboks 32, FO-110 Tórshavn í hendi í seinasta lagi fríggjadagin 18. mars 2005. Viðmerkið umsóknina "Heilsu- og umhvørvisfólk".